# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Sjúkrarøktarfrøðiskúlin 50 ár

Mánadagin 1. februar var hátíðarhald á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya, í sambandi við, at 50 ár eru liðin, síðan skúlin varð settur á stovn.

Í hesum sambandi varð móttøka á skúlanum í Jónas Broncksgøtu í Havn, har nógv fólk stukku inn á gólvið, bæði núverandi og fyrrverandi sjúkrafrøðingar, eins og onnur sum hava havt tilknýti til skúlan.

Skúlin var øll árini knýttur at Landssjúkrahúsinum, men tá ið skúlamál vórðu yvirtikin, varð Sjúkrasystraskúli Føroya, sum skúlin æt tá, lagdur undir Mentamálaráðið.

Skúlin hevur fylgt við í altjóða menningini av útbúgvingini til sjúkrarøktarfrøðing. Í dag er útbúgvingin akademisk, og frá 1. august 2008 partur av Fróðskaparsetri Føroya.

Rektari á skúlanum er Súsanna M. Mortensen.

-red



*Súsanna M. Mortensen rektari á skúlanum heldur røðu. Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna og Jóan Pauli Joensen rektari hildu eisini røðu*

*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Nógvar myndir vóru av sjúkrarøktarfrøðingum*



*Eyðun Joensen saman við fyrrverandi sjúkrarøktarfrøðingum*



*Borgarstjórin var millum tey mongu, sum stukku inn á gólvið*

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Signeva Sømark, Skálavík**, ættað úr Dali, andaðist í heiminum týsdagin 2. februar, 84 ára gomul.

**Sonja Ørkedal, fødd Petersen av Sevmýri, Tvøroyri,** andaðist fríggjadagin í Vatne, Ålesund, 79 ára gomul.

**Karl Jacob Petersen, Klaksvík**, andaðist í heiminum leygarmorgunin, 61 ára gamal.

## Merkisdagar

**50 ára føðingardagur**
18. feb. verður Símun Poulsen, Bøgøta 15, Klaksvík, 50 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 20. feb í Skálanum frá kl. 17, har øll eru hjartaliga vælkomin. Tey í vilja gleða Símun við at koma í føðingardag, kunnu siga frá á tlf. 221265 ella 220109 innan 14. feb.

**70 ára føðingardagur**
Í dag 3. feb. fyllir Jenny Risom Pedersen 70 ár.

**80 ára føðingardagur**
Mánadagin 1. feb. verður Hans Poulsen, Klaksvík, ættaður av Eiði, 80 ár. Føðingardagurin verur hildin 6. feb. hjá dótturini í Kristiansgøtu 37, Hoyvík frá kl. 17.

**80 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 5. feb. verður Leivur Ellingsgaard, optikkari, ursmiður, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin í Skálanum frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúðleyp**
Hósdagin 4. feb. hava Oda og Árni Frederiksberg, á Strondum, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin fíggjakvøldið 19. feb. frá kl. 18 í Kelduni í Skálafirði.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 5. feb. hava Aðalbjørg og Sigurd Joensen í Oyndarfirði diamantbrúðleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 6. feb., kl. 15, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 6. feb. giftast Niza Pardillo, av Filipsoyggjunum og Hans Hilmar Johannesen av Toftum. Vækomst verður á Svangaskarði kl. 19. Tey, ið ynskja, at gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um, at siga frá á tlf. 748134/448134 innan 2. feb.

**Brúdleyp**
Leygardagin 6. feb. kl. 14 giftast í Filadelfia, Bergur Enghamar Jacobsen og Theresa Adjin-Tettey Petersen. Veitslan verður fyri innboðnum kl. 19 í Pállstovu.

**Brúdleyp**
Leygardagin 13. feb. giftast Joyce Idan, Ghana og Robert Hansen, Nes. Vælkomst verður í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum frá kl. 19. Tey, ið ynskja, at gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um, at siga frá innan 10. feb. á tel. 283756 ella á 447756.

**Prógv**
Karin Elisa Johannesen úr Miðvági tók tann 18. jan. prógv sum professionsbachelor í sjúkrarøktarfrøði á Professionshøjskolen Metropol í Keypmannahavn.

## Dagurin

**3. februar, Blásius**, deyður umleið ár 300. Tikin av døgum fyri trúar sakir. Var biskupur í Sebaste í núverandi Turkalandi, og av tí at hann bjargaði einum smádrongi, sum hevði sett eitt fiskabein í hálsin, varð hann tilbiðin sum verndari fyri hálsverk. Dagurin var eisini róptur blámessa, og var blámessudagur stillur og klárur, boðaði tað fyri einum brúsandi vári, varð sagt.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Prógv

Fríggjadagin fekk Tanja Leosdóttir Poulsen handa prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur við Professionshøjskolen Metropol í Keypmannahavn



Lesið Sosialin -so eru tit við!